


# Ársaðalfundur í Eik Banka P/F

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í Eik Banka P/F

## fríggjadagin 11. apríl 2008, kl. 17.00

á Hotel Føroyum, Tórshavn

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki hjá Eik í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og ársfrágreiðing til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum
4. Heimila nevnd at lata Eik ognast upp til 10% av egnum partabrøvum í tíðini fram til næsta aðalfund
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Uppskot til viðtøkubroytingar
8. Áseting av yvirskipaðum leiðreglum fyri incitamentssamsýning til nevnd og stjórn
9. Ymiskt

**Ársroknskapurin 2007 og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum**
Ársroknskapurin 2007 við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum fara at liggja frammi á høvuðsskrivstovuni Yviri við Strond 2 í Tórshavn í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Partapeningur og atkvøðurættur**
Partapeningur felagsins er kr. 812.927.400 lutaður sundur í 8.129.274 partabrøv.

Umboðsráðið útinnir atkvøðurættin hjá partaeigarunum á aðalfundinum.

Partaeigarar hava atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

**Bílegging av atgongdarmerkjum**
Atgongdarkort verða útflýggjað teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi mánadagin 7. apríl 2008 hava bílagt umvegis heimasíðu okkara eik.fo ella biðið stjórnarskrivstovuna um hetta á tlf. 348 571 ella 348 565.

**Kontuførandi peningastovnur**
Partaeigarar kunnu velja Eik Banka P/F sum kontuførandi stovn fyri at útinna síni fíggjarligu rættindi í Eik Banka P/F.

Eik Banki P/F
Nevndin

www.eik.fo

VASTI 459010